# alt



**TUNNIL**

*Nógv verður tosað, men lítið gjørt fyri at geva gjáarfólki tann nógv eftirspurda tunnilin. Myndin vísir eitt uppskot til eina slíka linjuføring. - Tað skal kortini meiri til enn ein tunnil, um bygdini skal vera lív lagað, sigur gjáarmaðurin, Sofus Johannesen (innfeldur)*

*Mynd: landsverk.fo*




**» Hendan verkætlanin má og skal raðfestast. Hon er alneyðug, skal Gjáar bygd verða lív lagað. Ferðsluviðurskiftini eru ótolandi ein alt ov stóran part av árinum**

TORBJØRN JACOBSEN, TINGMAÐUR Í 2007

## 100

Fyri trimum árum síðani legði Landsverk fram eina sonevnda heildarætlan fyri alt samferðslukervið í Føroyum.

Ein partur av hesi verkætlan var farleiðin til Gjáar. Um hesa varð sagt, at vegurin liggur høgt og at hann harafrat er brattur, smalur, óregluligur og hevur ikki vegakslar.

Ikki óvæntað varð her sligið fast, at ferðslan á vegateininum ofta er tarnað av kava. Um sjálvt skarðið er vandi fyri skalvalopi og omanlopi

Enn er støða ikki tikin til, hvør loysnin er tann rætta fyri fólkið við Gjógv. Sagt verður, at talan kann gerast um ein tunnil á farleiðini, soleiðis at sleppast kann undan tí truplasta teininum.

Kostnaðurin fyri hetta varð tá mett til 100 mió krónur, og skuldi sambært ætlanini byrja í 2019.

## Uppskot um tunnil

Á politiskum støði eru tikin ávís stig til at fáa ynskið hjá gjáarfólki at gerast veruleiki. Fyri trimum árum síðani legði tingmaðurin úr Tjóðveldi, Torbjørn Jacobsen uppskot fram um ein tunnil Gjáar.

Hann vísti á, at á vári í 2002 samtykti løgtingið at gera forkanningar til tunnilsgerð ímillum Funning og Gjógv.

- Hendan verkætlanin má og skal raðfestast. Hon er alneyðug, skal Gjáar bygd verða lív lagað. Ferðsluviðurskiftini eru ótolandi ein alt ov stóran part av árinum, vísir tingmaðurin á.

Sambært skitsuprosjektinum, sum gjørt er um sambandið ímillum Funning og Gjógv, snýr verkætlanin seg um 960 metrar av vegi í Funningi, 1800 metrar av bergholi og 1150 metrar av vegi Heimi í Dal, Gjáarmegin.

Men tá til stykkis kom, og atkvøðast skuldi um tað 2. mai 2007, fekk uppskotið bert 9 atkvøður fyri, meðan 11 vóru ímóti.

Sostatt fall hetta uppskotið.

um, at hetta kanska kann tykjast lítisvert. Hann er kortini sannførdur um virðið í slíkum átøkum, sum ein bygd tekur.

- Jú, hetta hevur stóran týdning fyri trivnaðin í bygdini, men tað er kortini ikki bert hetta, ið skal til.

- Tað týdningarmesta er at hava fólk við hugflogi og áræði. Fáa vit slík fólk til Gjáar, so ber nógv til, slær Sofus fast.

Sum víst verður á í aðrari grein í hesum Oyggjablaðnum, eru ávísar ætlanir um bygging við Gjógv.

Tað er hinvegin ein royndur veruleiki, at seinastu árini eru ongi nýggj sethús bygd, og tí hevur kommunan tikið stig til at leggja øki av til summarhús.

- Tankin við hesum er, at tá fólk ikki seta búgv við Gjógv, er frægari at fáa nøkur summarhús, sigur Sofus Johannesen, sum eisini er bygdaráðslimur í Sunda kommunu.

Eftir hansara sannføring vilja fólk, tá tey hava brúkt fleiri hundrað túsund krónur upp á eitt slíkt summarhús, so vilja tey nýta húsini mest møguligt. Harvið kann meiri lív fáast í bygdina, í hvussu er partar av árinum.

- Men, sigur ein vónríkur Sofus.

- Kanska onkur finnur útav, at tað ber væl til at búgva í bygdini og tískil vera her størri part av árinum?

- Vit halda í hvussu er, at vit hava onki at missa við hesum átaki, men alt at vinna.

snorri@sosialurin.fo